# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Jenis av Rana, løgtingsmaður

**Svarari:** Margit Stórá, landsstýriskvinna í heilsumálum

**Evni:** Heimild til viðgerð á Center for kønsidentifikation

**Spurningar:**

1. Hvussu nógvir av teimum 18 føroyingum, sum seinastu 5 árini eru sendir av landinum til danska Center for kønsidentifikation, eru, sum úrslit av hesum kanningum, vorðnir viðgjørdir við:

   a: hormonum ella líknandi heilivági?
   b: skurðviðgerðum?

2. Hví sendir føroyska sjúkrahúsverkið frískar borgarar av landinum til sálarfrøðiligar, medisinskar og sosialar kanningar og metingar?

3. Í hvørjari lóg, og hvar í slíkari, finst heimild hjá læknum í sjúkrahúsverkinum at senda frísk fólk av landinum og áleggja føroyska skattaborgaranum at gjalda fyri kanningar og møguliga viðgerð av hesum borgarum, sum, sambært sama sjúkrahúsverki, ikki hava staðfesta sjúku?

4. Hvussu nógv hava hesar kanningar, metingar, viðgerðir, ferðingar og uppihald higartil kostað føroyska samfelagnum?

5. Hvussu er aldurs- og kynsbýtið fyri hesi av landinum sendu?

**Viðmerkingar:**
Í svari frá føroyska Landssjúkrahúsinum til foreldur, dagfest 21. juli 2023, lesa vit m.a.:

a: at endamálið við útgreiningini í Danmark er at finna útav, um viðgerð fyri kynsskifti er rætti vegurin at fara.

b: at vanliga fevnir útgreiningin um sálarfrøðiligar, medisinskar og sosialar kanningar og metingar. Útgreiningin tekur í miðal 6-8 mánaðir, og um persónurin uppfyllir treytirnar fyri viðgerð, so ber til at fáa hormonviðgerð ella skurðviðgerð.

c: at heilsumyndugleikarnir ynska at undirstrika, at talan er ikki um fysiska ella psykiatriska sjúku.

e: at tað er Center fyri Kønsidentitet, sum hevur ábyrgd av viðgerðini.

Leggjast skal afturat, at í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið, sum føroyska sjúkrahúsverkið verður stýrt eftir, herundir eisini parturin um møguliga víðarisendan av borgarum til útlond, einans fevnir um sjúklingar.

**Á Løgtingi, 5. september 2023**

Jenis av Rana